# Bilar

Nr. 249 • mikudagur • 28. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo




· Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
· Vit umvæla øll bilmerki
· Klárgering til sýn
· Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.

Ring og fá eitt tilboð

**Sp/f Plátuverkstaðið**
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo


Opel Zafira og Antara GTC:

# Dupultur sigur til Opel

**140 evropeiskir motorjournalistar hava kosið tveir Opel bilar sum ársins "Top Car 2006". Talan var um familjubilin Opel Zafira og konseptbilin Antara GTC**

**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Talan var um dupultan sigur til Opel, tá 140 motorjournalistar úr fleiri evropeiskum londum valdu familjubilin Opel Zafira og konseptbilin Antara GTC til "Top Cars 2006".

Hetta er samstundis fyrstu ferð at teir mongu motorjournalistarnir ið eru knýttir at felagsskapinum "Motor Information Service" avkvøddu um 80 bilar í 8 ymiskum klassum.

Nýggi Opel Zafira er sera væl umtóktur í eitt nú Týsklandi, har sølan er meira enn tvífaldað. Konseptbilurin Opel Antara GTC kemur á marknaðin síðst í 2006.




*Konseptbilurin Opel Antara GTC og familjubilurin Opel Zafira eru kosnir "Top Cars 2006", av 140 evropeiskum motorjournalistum*

# Saab 9-3 SportSedan fekk gullmedalju í USA

**Saab 9-3 SportSedan fekk hægstu viðurkenning og gullmedalju í fyrstu útnevningini við heitinum "Top Safety Pick - Gold Award" hjá Insurance Institute for Highway Safety í USA**

At svensku bilmerkini fáa besta karakter fyri trygd er ikki nakað nýtt fyribrygdi, og tað at Saab 9-3 SportSedan fær hægstu viðurkenning fyri trygd, undirstrikar bert hvussu nógv Saab hava gjørt fyri at tryggja bilføraran og tey ferðandi í bilinum, verður sagt í tíðindaskrivi frá Institute for Highway Safety í USA.

"Top Safety Pick - Gold Award" verður bert givin fyri tað besta av tí besta. Bilurin fekk eisini besta úrslit í EuroNCAP krasjtestunum í Evropa.

Insurance Institute for Highway Safety er ein amerikanskur stovnur, sum serliga arbeiðir við menning og samskifti. Eisini granska teir í hvussu tryggir bilarnir á marknaðinum eru og almannkunngera úrslitini, teir koma til.

Saab 9-3 verða eisini gjørdir sum SportCombi (stationcar) og sum cabriolet.




*Saab 9-3 SportSedan fekk hægstu viðurkenning og gullmedalju í fyrstu útnevningini við heitinum "Top Safety Pick - Gold Award" hjá Insurance Institute for Highway Safety í USA*